# Edward vitjaði á prentsmiðjuni



**Fyrr í hesi vikuni vitjaði Edward Fuglø á prentsmiðjuni í Eysturríki, sum skal prenta nýggju frímerkini, ið hann hevur teknað**

FRÍMERKI

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Østerreichische Staatsdrukerei, sum hevur meira enn 200 ár á baki, skal prenta nýggja frímerkjaarkið, sum listamaðurin Edward Fuglø hevur teknað.

Fyrr í vikuni vitjaði Edward á prentsmiðjuni, sum liggur í Wien, og har skuldi hann góðkenna uppsetingina og forprentið av frímerkjaarkinum, sum Postverk Føroya skal geva út. Við á ferðini var eisini Svanbjørg Manai, ið er leiðari á Frímerkjadeildini.

Edward Fuglø er nærlagdur, og har skal einki vera, sum kann verða at seta fingurin á, eftir at frímerkið er prentað.

Edward hevur teknað nógv frímerki til Postverk Føroya, og eina árið var eitt av hansara frímerkjum nummar tvey í eini kapping millum øll tey vakrastu frímerkini í Europa.

Eftir at hava kannað uppsetingina og forprenti gjølla, var prentið góðkent, og nýggja frímerkið kemur út í heyst.

*Edward Fuglø og Svanbjørg Manai kanna, um alt er í lagi við nýggja frímerkjaarkinum, sum Edward hevur teknað til Postverk Føroya*

*Mynd: Dávur Winther*


# Hjá okkum fært tú eina lønandi útbúgving

FØROYA BANKI

**Byrja tína yrkisleið sum næmingur í Føroya Banka.**

**Sum fyrsti børsskrásetti bankin í Føroyum er Føroya Banki eitt nýmótans arbeiðspláss, ið virkar eftir altjóða virkishættum.**

**Visión Bankans er at vera leiðandi banki í Føroyum og altjóða at veita kundum útvaldar fíggjartænastur. Missiónin er at gera tað fíggjarliga møguligt hjá kundunum at fullnýta síni evnir og sínar møguleikar. Í Bankanum arbeiða vit eftir hesum virðum: dugnasemi, eldhuga og framsøkni.**

**Vilt tú verða partur av framtíðini hjá Føroya Banka? Vilt tú vera ein av okkum?**

**Umsóknarfreistin er 1. august.**

**Les meira á www.foroya.fo**



**»Tá eg var líðug í skúlanum, søkti eg lærupláss nógvastaðni, men eg valdi Føroya Banka, og tað eri eg glað fyri«**
**– Anita Knudsen**